
nøvn nú nøvn nú nøvn nú

Heilsanir



Góða Ena
Hjartaliga tillukku við 15 ára degnum 14.10.
Heilsan, tann, ið tók myndina
P.S. Ikki bliva ill!



Hjartaliga tillukku.
Heilsan, ein vinkona



Góða langomma
Hjartaliga tillukku við degnum í dag. Langabbi fær eisini eina heilsan. Takk fyri tað tit eru fyri meg. Alt tað besta framyvir ynskir ***Brynja***




Góða Ena
Hjartaliga tillukku við 15 ára føðingardegnum.
Heilsan, tær svøku



Hey, Egil
Tillukku við 40 ára degnum 11. okt. Ja, hetta vóru aðrir dagar í Ullebar. Knallertin bíðar uttanfyri.
Heilsan, servitrisan



Jakoba Svensdóttir
Ommu'sa og abba'sa fitta didda, hjartaliga tillukku við degnum í dag. Jesus pápi signi teg ynskja ***omma og abbi***



Erla Erlingsdóttir
Góða systir, hjartaliga tillukku við 5 ára degnum, og góða Jakoba, mostir ynskir tær tillukku við 1 ára degnum.
*Muss og klemm frá **Eyðbjørg***

nøvn nú **5 ferðir um vikuna** 20,- kr.

GEVIÐ GÆTUR:
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 20,- kr.
í ❑ frímerkjum, ❑ krossaðum kekki
fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.
Myndaheilsanir, sum eru okkum í hendi við postinum kl. 8 á morgni, leggja vit okkum eftir at fáa í blaðið dagin eftir. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:

.....

.....

.....

.....

.....

MYNDINA AFTUR: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur **(skal fyllast út).**

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur: Tlf.:

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Tíðindablaðið Sosialurin
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»NØVN NÚ«**

Brúdleyp

Leygardagin 17. okt. kl. 16.00 giftast í Fuglafjarðar kirkju Maikin Dora Andreassen av Viðareiði og Esmar Mikkelsen úr Syðrugøtu, búsitandi í Saltangará.

Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Lorvík. Vælkomst verður kl. 23.00.

Halt sosialin

Tiltøk

KFUM & KFUK, Tórshavn
Opið hús er í KFUM hvørt fríggjakvøld. Børn *undir* 13 ár kl. 17–21. Ung *yvir* 13 ár inntil kl. 01.00.

Ebenezer, Tórshavn
Sunnudag kl. 12: Sunnudagsskúli.
Sunnukvøld kl. 18: Evangeliskt møti.
Sunnukvøld kl. 21: Útimøti.
Mánakvøld kl. 20: Bønamøti.
Mikukvøld kl. 20: Uppbyggingarmøti.
Hóskvøld kl. 20.00: Ungdómsmøti.

Immanuel
Møti verður í kvøld kl. 20.30.

Rhema á Hálsi
Í kvøld kl. 20 verður húsmøti hjá Peturi og Stellu, Reynsgøta 29, Argir.
Sunnudagin kl. 17: Møti og sunnudagsskúli.
Vikuskiftismøtir verða í skúlanum í Kaldbak hetta vikuskiftið.
Fríggjakvøldið kl. 20: Evangeliskt møti.
Leygarkvøldið kl. 20: Ungdómseksplosjón. Sýndur verður eisini filmurin »Sum tjóvur á nátt« á stórskíggja.
Sunnukvøldið kl. 20: Evangeliskt møti.
Øll eru vælkomin.

Vikuskiftisfundir í skúlanum í Kaldbak
Fríggjakvøldið kl. 20: Evangeliskt møti.
Leygarkvøldið kl. 20: Ungdómseksplosjón. Sýndur verður eisini filmurin »Sum tjóvur á nátt« á stórskíggja.
Sunnukvøldið kl. 20: Evangeliskt møti.
Møtini verða við ymiskari luttøku.
Øll eru vælkomin.

Keldan í Skálafirði
Hósdagin kl. 16.00 byrjar barnalegan.
Sunnudagin kl. 17: Familjumøti, luttøka frá barnaleguni.

Samkoman Sion, Vágur
Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00. Evangeliskt møti kl. 18.00.
Telefonandaktin svarar á 73777.

Betel, Vágur
Ónsdagin kl. 20: Uppbyggingarfundur.
Tórsdagin kl. 20: Ungdómsfundur.

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 13978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 19793, Mari Johannesen.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í gomlu lærarahúsunum. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla (gamla læraraíbúðin).

AA-fundur
verður í kvøld kl. 20 í Tórsgøtu 5 (inngongd vestanfyri).

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi av alkoholikarum er hvønn leygardag kl. 15.30 á Brandstøðini á Oyrarbakka.

Bahá'í Miðstøðin í Gundadali
Opið er hvønn hósdag frá kl. 17.00–20.00.
Bahá'í-samfelagið í Tórshavn

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Tlf. 316491
Opið er hvønn mánadag-fríggjadag frá kl. 10.00–17.00.
Drekkamunnur og bløðini er at fáa hvønn dag.
Mikudagin 14. okt.:
kl. 12–13: Døgurði. Tilmelding mánadag (316491)
kl. 14–17: Túrur við bussi út til Marknagil og til gongu heimaftur.
Í vetur verður matgerð í Tilhaldinum undir kvøldskúlaskipanini í 8 vikur. Hvønn mikudag kl. 10.30–13.05. Lærari er Anne Grete Harlou. Tilmelding á tlf. 421580.
Hósdagin 15. okt.:
kl. 10.30–11.00: Fimleikur. Sonja Danielsen.
kl. 14.00–17.00: Teldupról. Brandur Petersen.
Fríggjadagin 16. okt.:
kl. 15–17: Søgan um Tórsgøtu.
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.00 til kl. 15.00. Tlf. 1.7597, skrivitlf. 1.6929
fax 1.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

Amnesty International Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin: Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Felagið Føroyar-Kuba
Opið er á skrivstovuni í Kongagøtu 11, mikudag kl. 16-18. Mánad., týsd., hósdag og fríggjad. kl. 10-11. Tlf. 13016 - Fax 13824.

Sjómansheimið »Ørkin«
Brautarholt 29,
105 Reykjavík
Sunnudag møti kl. 17.
Mánakvøld bíbliutími kl. 20.30.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Nærri upplýsingar á tlf. 009 354-568-0777